Altjóða Skrivstovan
International Office




**Møguleiki er aftur at taka sonevndu TOEFL iBT-royndina í Føroyum. TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovnum í enskmæltum londum.**

Royndin verður fríggjadagin 13. mars 2009 kl. 10 á Fróðskaparsetri Føroya, Nóatúni 3.

Tilmeldingarfreistin hjá TOEFL er í seinasta lagi 8 dagar undan royndini, men mælt verður til at melda seg til í góðari tíð vegna avmarkað pláss hjá okkum.

Tilmelding fer fram on-line á: www.ets.org/toefl

Kostnaðurin er 155 USD.

*(Test of English as a Foreign Language)

ASK

**Altjóða Skrivstovuna**
tlf. 322065
ask@ask.fo
www.ask.fo

**Fróðskaparsetur Føroya**
tlf. 352500
setur@setur.fo
www.setur.fo



FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ



## Umsóknarfreistin er 15. mars 2009

Umsóknarbløð fáast á:

- Skrivstovu skúlans tlf. 312973
- Heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ











## Spennandi útbúgvingar
### eitt hav av vinnumøguleikum

**Maskinmeistari**
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina er tvær ferðir um árið: í januar og í august.

**Maskinistur**
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinistútbúgvingina er eina ferð um árið og byrjar í august.

**Skipari**
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

**Skipsførari**
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum høvum.

Upptøka til skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar er tvær ferðir um árið: í januar og í august.

Maskinist- og maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING
Postboks 104 · FO-110 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · vh.fo